BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*"Tað ringasta við at vera so ovurhonds ríkur er at konan er givin við at matgera sjálv"*

*Sitat: Henry Ford*

# Palfinger framsýning hjá KJ Hydraulik




*Gerhard Karrer, stjóri hjá Palfinger í Skandinavia, Viggo K. Johannesen, sølustjóri, og Sofus S. Gregersen, marknaðarleiðari hjá KJ Hydraulik*

**Fríggjakvøldið 21. juli skipaði KJ Hydraulik fyri einum Palfinger tiltaki í Mykinesgøtu í Havn, har umleið 40 lastbilaeigarar og entreprenørar vóru møttir**

KRANAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Kvøldið byrjaði við eini framsýning uttan fyri hjá KJ Hydraulik í Mykinesgøtu, har nakrir lastbilar við nýggjum Palfinger kranum vóru sýndir fram. Kranar hava stóran týdning í øllum byggivirksemi. Nýggjastu kranarnir eru sera framkomnir, teir arbeiða skjótt, eru lættir at handfara og stórur dentur er lagdur á trygdina. Eisini varð nýggjasta útgerðin til kranar sýnd fram.

Síðan var farið inn, har eitt flott sjálvtøkuborð við sjógæti frá Poul Rustin í Fuglafirði var sett upp. Palfinger-stjórin fyri Skandinavia, Gerhard Karrer, hevði eina áhugaverda videoframløgu av Palfinger fyritøkuni, og vísti hvørji virkisøki fyritøkan fæst við. Hann sýndi fram teir nýggju kranarnar og serligu eginleikarnar við Palfinger kranunum.

Palfinger fyritøkan varð stovnað í Eysturríki í 50-unum. Teir gera kranar, ið kunnu lyfta frá einum tonsi upp til 150 tons. Palfinger er heimsins størsta fyritøka av sínum slagi og fremstir innan framkomna tøkni. Umframt fleiri verksmiðjur í Evropa eru Palfinger verksmiðjur í t.d. USA, Kanada, Brasilia og í Kina.

Í Føroyum er tað fyritøkan KJ Hydraulik við høvuðssæti á Kambadali, ið umboðar Palfinger-kranarnar. KJ Hydraulik er kend fyri sín serkunnleika innan hydraulik og maskintøkni. Fyritøkan veitir og serviserar útgerð til fiskiídnaðin, alivinnuvinnuna á sjógvi og landi, umframt flutningsvinnuna og byggivinnuna. Fyritøkan veitir eisini útgerð og tænastur til marknaðir uttanlands.

Fyrr í ár setti KJ Hydraulik á stovn eina deild í Mykinesgøtu í Havn og keyptu grannafyritøkuna Norð Trukk.




*Uttan fyri hjá KJ Hydraulik í Mykinesgøtu vóru lastbilar við nýggjum Palfinger kranum vóru sýndir fram*



*Stórur áhugi var fyri at royna nýggju Palfinger- kranarnar*



*Umleið 40 fólk vóru møtt til Palfinger tiltakið*